FØÐINGAR

13. juli fingu Katrina F. Gaard og Tue Rosenkjær, Svendborg, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

18. juli fingu Harriet Hjelm og Johannes Joensen, Vági, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4660 gr.

21. juli fingu Karen Johansen og Ronny L. Olsen, Rituvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3955 gr.

21. juli fingu Noomi og Júst Poulsen, Hvannasund, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2890 gr.

21. juli fingu Sólrun og Vagn Foldbo, Leirvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3200 gr.

22. juli fingu Kaja og Jan Joensen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3290 gr.

22. juli fingu Joan og Sofus Olsen, Skopun, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr.

22. juli fingu Elma og Jón Poulsen, Strendur, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4070 gr.

24. juli fingu Karin Louisa og Óli Nicodemussen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr.

25. juli fingu Malan Jensen og Kaj Wacher, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3900 gr.

ANDLÁT

22. juli
Magnus Jacob Hansen, í Vági, 86 ár.
Helga Toftegaard, úr Fuglafirði, 83 ár.
Óli Andreas Johannesen, úr Funningi, 79 ár.

23. juli
Gudjon Jacobsen, á Eiði, 55 ár.
Maja Hansen, ættað av Slættanesi, búsitandi í Søborg, 72 ár

25. juli
Regin Krossteig Nielsen, í Tórshavn, 57 ár.

26. juli
Edmund Petersen, úr Vági, 88 ár.

KIRKJUR & SAMKOMUR

Gudstænastur ólavsøkudag
Havnar kirkja: Meinhard Bjartalíð kl. 11

Gudstænastur 6. sunnudagur eftir Trinitatis
Havnar kirkja: Lestur kl. 11
Vesturkirkjan: Heri Joensen kl. 11
Kaldbak: Sonja Klein kl. 12
Søldarfjørður: Jónsvein Bech kl. 11, altargongd
Fríðrikskirkjan: talvan gongur fyri Hina føroysku sjómansmissiónina
Funningur: Emil Olsen kl. 12, messa
Miðvágs kirkja: Inga Poulsen Dam, altargongd

Ebenezer
Ólavsøkuaftan: Kl. 21.00: Útimøti. Kl. 22.30: Opið hús í Ebenezer.
Ólavsøkudag: Kl. 10.00: Møti har Svenning av Lofti talar. Kl. 15.00: Barnamøti. Kl. 21.00: Útimøti. Kl. 22.30: Opið hús úti á Fløtum.

Filadelfia, Landavegur 22
Ólaløkuaftan kl. 06.00 morgunbøn.
Ólavsøkudag kl. 06.00 morgunbøn, kl. 16.00 lovsangur í Grasagarði.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Ólavsøkuaftan: kl. 17 og kl. 23 útimøti.
Ólavsøkudag: kl. 16 útimøti. Kl. 20 møti í Frelsunarherinum. Kl. 23 útimøti, Major Njál Djurhuus talar, Palli Petersen leiðir.
Sunnudagin: kl. 11 møti, Major Samuel Joensen talar. Major Njál Djurhuus leiðir. Kl. 18.00 møti. Major Njál Djurhuus talar. Major Samuel Joensen leiðir.

Meinigheitshúsið í Havn
Ólavsøkuaftan møti kl. 20 v/ Niels Jacob Nielsen, trúboðara. Opið hús kl. 24, ungdómurin skipar fyri.
Ólavsøkudag møti kl. 20 v/ Alfred Olsen.
Sunnudagin møti kl. 18 v/ Niels Jacob Nielsen, trúboðara. Sangbólkurin Gittit luttekur.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Kl. 17.30 bøn, kl. 18 vitnimøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 11 møti. Fríðtór Debes talar. Øll eru vælkomin.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnukvøldið kl. 19 verður ytrimissións panel við ymiskum trúboðarum.
Barnaansing og drekka. Øll eru vælkomin.

Keldan í Skálafirði
Sunnudagin kl. 19 møti við Terja Vestergaard o.fl.
http://www.keldan.fo

Skopunar Missiónshús
Sunnudagin kl. 18.30 lovsangur, sunnukvøldið kl. 19 møti.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Vikuskiftismøtir:
Leygarkvøldið kl. 20 verður møti við Alfred Poulsen.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Jacob Poulsen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks. Frá 3. juli til 14. august verður Tilhaldið opið soleiðis: mánadag-fríggjadag frá kl. 14-18.
Framsýning á ólavsøku frá 28.–30. juli kl. 14–18. Á miðhæddini í Tilhaldinum er ein framsýning við tekningum úr Realskúlanum í Havn, sum næmingar hjá Jákup M. Kjeld lærara umleið 1953–60 hava teknað, og í kjallaranum er ein skúlamynda-framsýning við gomlum myndum úr skúlum í Havn.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundir verða fríggjakvøldið kl. 20-21 og kl. 22.30-23.30. Leygardagin kl. 17-18. Sunnudagin kl. 11-12 og evnisfundur kl. 20-21.30.

Al-Anon fundir í Havn
Fundir eru hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 21.00 á Vaskarínum.

AA-fundir í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla læraraíbúðin).

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Eitt ljós á gøtu míni

Ólavsøka

Lovið Harranum í templi hans, soleiðis ljóðar yvirskriftin til sálm 100, sum eisini í øldir kann hava staðið sum yvirskrift yvir einum parti av ólavsøkuhaldinum.

Templið hevði alstóran týdning fyri Ísraels fólk. Jesus var glaður um at koma har. Einaferð ruddaði hann halgidómin, koyrdi teir, sum seldu og keyptu, út. Tí hann vildi leggja dent á, at fólk áttu at koma í halgidómin til í friið og náðum at halda bøn og vera saman við Gudi.

Ein av ólavsøkutekstunum er úr Jóhs. 12,24-26, eini talu, Jesus helt um dýrmetan av menniskjusoninum. Her er í fyrstu syftu ikki talan um, hvussu hann vil, at menniskju skulu tala um hann við føgrum orðum o.s.fr. Men her ræður um, hvør Jesus var og hvønn týdning hansara lív og deyði fór at fáa fyri mannaættina.

Hann nýtir myndina um hveitikornið, sum má »doyggja« fyri at bera ávøkst, soleiðis sum vit her hjá okkum betur kenna tað um eplið, sum vit settu niður í vár og nú liggur deytt undir liðini á teim ljósu, nýggju eplunum, vit um stutta tíð fara at taka upp.

Tað stóð Jesusi í boði í sínum foldarlívi at verða dýrmettur á tann hátt, okkum dámar. Hevði hann tikið av at elska lív sítt í hesum, sum vit hava lyndi til, so sat hann eisini sum kongur Ísraelsmanna.

»Men doyr hveitikornið, tá ber tað miklan ávøkst«. Við Jesu deyða á krossinum stungu skot seg út um lond, og menniskju kundu taka nýtt upp, sum ikki bara var góð føði, men gav einum og hvørjum rætt mótvegis Guði at liva sum hansara.

Í okkara oyggjum kyknaði hetta lív fyri 1000 árum síðani. Vit plaga at siga, at tað var Ólavur kongur hin heilagi, sum sendi mann higar at seta niður, og tað bar ávøkst.

Ólavur kongur fall á Stiklastøðum í orrustu undir krossmerkinum. Teir kønu meina, at hann hevði lættari vunnið ríkið aftur, um hann ikki helt so fast við kristnu trúgv sína. »Tann, sum elskar lív sítt missir tað«. Tað var eins og Ólavur Haraldsson ikki vildi vita av hesum.

Hann kom við sínum deyða at fáa størri týdning fyri savningina av Noregi, enn um hann hevði livað. Tí eftir deyða hansara gingu viðhaldsmenn og mótstøðumenn saman at heiðra hann. Og hann varð gjørdur halgimenni. Tað kemur so vakurt fram í bókini »Kristin Lavransdóttir« eftir Sigrid Undset. Hon letur Kristin standa í Nidaros dómkirkju framman fyri silvurskríninum, har Ólavur lá í. Kristin kemur at hugsa um, at har lá hansara likam og bíðaði eftir uppreisnardegi. Tá vildi hann stíga fram, og fólkið tyrpast um hann, og hann vildi biðja hesa bøn: Harri, hoyr hvat eg biði um fyri hesum fólki, sum eg hevði so kært, at eg heldur vildi tola friðloysi og neyð, hat og deyð enn at maður og kvinna skuldu vaksa upp í Noregi og ikki vita, at tú doyðli til frelsu fyri allar syndarar. Harri, tú sum beyðst okkum at fara at gera øll fólkasløg til lærusveinar tínar – við tínum blóði skrivaði eg, Ólavur Haraldsonur tín boðskap á norska málinum fyri fólki mínum.

Á ólavsøku koma nú prestar og fólkavald við embætisfólkum úr ymsum kirkjum og samkomum í halgidómin at lova Harranum við samfeldum ljóði.

»Ljósið rann, sum lívgar gleði,
ljós, ið vann í myrkri megi,
ljós, sum vert er lov og prís«

kj.m.

Læknavaktir

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033.

Eysturoy:
Fríggjadagin 28. juli:
Leif Mosekilde, Runavík, tlf. 447010
Leygardagin 29. juli
Erik Mitens, Skála, tlf. 441490
Sunnudagin 30. juli:
Leif Mosekilde, Runavík, tlf. 447010

Norðoyggjar:
Fríggjadagin 28. juli:
Jaspur Petersen, tlf. 456400
Leygardagin 29. og sunnudagin 30. juli:
Jens Nylander Madsen, tlf. 455045

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður):
Tlf. 371560

Suðuroy (suður):
Tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Fyrsta leygardag hvønn mánað: Altjóða nátturði «Potluck» kl. 18.30.
Opið hvørt fríggjakvøld: Samkoma kl. 20.
Bahá'í-samfelagið í Tórshavn

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Føroya Astma/ Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Javni
Skrivstovan verður stongd vegna summarfrí frá 15. juni. Ringjast kann til Dianu í Puntabyrgi tlf. 216510 ella Onnu Elisabeth Victorsdóttir, aftaná arbeiðstíð tlf. 315960.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

MBF
MBF-skrivstovan fer í summarfrí tann 17. juli fram til mánadagin 21. august.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr.
deaf_fo@post.olivant.fo

Føroysk gudstænasta í Reykjavík
Sunnudagin 25. kl. 14 verður føroysk gudstænasta í Háteigiskirkju í Reykjavík, Martin Restorff Jacobsen, prestur í Hvalvík talar.

Nærvarpið LUMI radio í Aalborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

Føroysk møti
Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Ørsuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Før. gudstænasturnar
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Malta, Hirtshals
Sunnudag:
Kl. 11: Breyðbróting.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.
Samkoman Malta í Hirtshals

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Heimamissiónin
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

Føroyingarfelagið í Aalborg
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
Húsið er opið soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17 A
1620 København V
Tlf. 33 23 15 87
Fax 33 23 15 18
Kunningartlf. 33 23 15 86, sum sigur frá øllum tiltøkum.
Heimasíða:
www.faroehouse.dk
E-mail:
postur@faroehouse.dk
Upplatingartíðir:
mánadag–fríggjadag:
kl. 16.00–19.00.
28.–30. juli: Ólavsøkuhald við fjølbroyttari skrá.
28. juli: Fernisering. Tórhild Tolfsen sýnir fram.

Føroyingafelagið í Árhus
Vestergade 48 D
8000 Århus C
Telefon og fax: 86180604
Teldupostur:
aarstova@teliamail.dk
Heimasíðan:
http://welcome.to/aarstova
Áarstova er opin soleiðis:
Café Mánad.-hósd.: kl. 16-18
Føroysku bløðini liggja frammi.
Fríggjakvøldsbarr: kl. 21-03
Limir ókeypis atgongd. Onnur kr. 10,-.
Onnur reglulig tiltøk í Áarstovu:
MFS. Meginfelag Føroyska Studenta hevur opið hvønn mikudag kl. 16-18.
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag kl. 11-14 (ólika vikur).
Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag kl. 14.30 (líka vikur).
Bókasavn. Føroyskar bøkur kunnu lánast mánadag-hósdag kl. 16-18.
Ítróttartiltøk:
Flogbóltur. Frydenlundskúlin fríggjadag kl. 16-18. Bussur nr. 4.
Svimjing. Frydenlundskúlin fríggjakvøld kl. 18-19. Bussur nr. 4.
Fótbóltur. Hasselager Hallen fríggjakvøld kl. 21-23. Bussur nr. 15.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyingar í Noregi
E-mail:
foroyar@norden.no
Heimasíða:
http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Ølduslóð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

Vika 30 - 26. juli

Vinnaratøl: **7 - 13 - 14 - 16 - 23 - 44**
Eykatøl: **3 - 33**

6 vinnaratøl:	**3.577.131,- kr.**
5 vinnarat.+1 eykat.:	**106.651,- kr.**
5 vinnaratøl:	**4.078,- kr.**
4 vinnaratøl:	**111,- kr.**
3 vinnaratøl:	**28,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

85 ár

Mánadagin 31. juli fyllir Óli Mortensen, Hetlandsvegur 4, 85 ár.

70 ár

30. juli fyllir Eiler Jacobsen, reiðari, Tórshavn, 70 ár. Hann er burturstaddur.

Brúdleyp

Leygardagin 12. august kl. 14.00 giftast í Berøa, Saltangará, Sanna í Túni, Toftir, og Niels Jacob Nielsen, Saltangará.
Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin at siga frá á tlf. 447972, 447944 ella 282043 áðrenn 1. august.

Leygardagin 19. august kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Maria Mohr Edvinsson, Sandi, og Egin Herup Høgnesen, Hoyvík.
Vælkomst verður í B36-húsinum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarligast biðin at siga frá innan 5. august á tlf. 313610, 319659, 219512 ella 361026.

Fríggjadagin 18. august kl. 15.00 giftast í Siloa í Fuglafirði Maria á Lakjuni, Fuglafirði og Bjørn Simonsen, Klaksvík. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 444404 ella 456252 innan 6. august.

Leygardagin 19. august kl. 16.00 giftast í Leirvíkar kirkju Hanna Y. Sólbjørg og Jonhard Høgnesen, bæði úr Leirvík.
Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 6. august á tlf. 443273 ella 443122.

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.
HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.
GÓLV FRESING
GÓLV SLÍPING
GÓLV SAGING
Rennir, keiðki, asfalt, uppteka og burturbeining o.a.
Sosialurin-2311601
FØROYA BETONG v/Hjaltur Tausen SAGING
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

Silvurbrúdleyp

Sunnudagin 30. juli hava hjúnini Malan og Jógvan D. Jakobsen, Viðareiði, silvurbrúdleyp.
Tey eru stødd í Qaanaaq í Grønlandi.

Mikudagin 16. august hava hjúnini Karis og Petur Olaf Petersen silvurbrúdleyp.
Dagurin verður hildin leygardagin 19. august. Vælkomst verður í Kobbelvænget 1, Fredericia kl. 17.00. Boðið vinarliga frá luttøku áðrenn 1. august á tlf. (0045) 75915293 - 447342 ella 442108.

Mikudagin 23. august hava hjúnini Dinna og Eyðun Jacobsen, Glyvrar, silvurbrúdleyp.
Dagurin verður hildin fríggjadagin 25. august kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum henda stóra dag, verða biðin um at siga frá áðrenn 12. august á tlf. 448355 ella teldupost: eydunj@post.olivant.fo

Prógv

Jógvan á Høvdanum (y), Klaksvík, hevur 12. mai 2000 lokið yrkisútbúgving innan smásølu (Isenkram og Amboð). Læruplass: Klaksvíkar Timburhandil.

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo